## Eysturoyar Røktar-og ellisheim

# Søkt verður eftir **leiðara** til deildina fyri minnisveik

Talan er um farloyvisstarv 0,8 tíð frá 15.03.08 at rokna og eitt ár fram. Starvið umfatar deildina Heimi á Mýrunum við 8 búfólkum og deildina á Røktarheiminum við 8 búfólkum.

Umstøðurnar á heiminum eru góðar og væl egnaðar til fólk, ið eru minnisveik.

Endamálið er at geva minnisveikum fólki, við serligum tørvi á umsorgan, eina trygga og stimbrandi tilveru. Miðað verður ímóti at arbeitt verður eftir Eden arbeiðsháttinum.

Umsøkjari við avvarðandi leiðsluútbúgving og leiðsluroyndum og royndum innan demensøkið hevur fyrimun.

Stórur dentur verður lagdur á, at trivnaður bæði fyri búfólk og starvsfólk framvegis eyðkennir heimið og vænta vit tí av tær, at tú hevur áhuga og gleði við, at samskifta við eldri fólk og at tú hevur vilja og eginleikar at samskifta við starvsfólk og avvarðandi.

Somuleiðis er umráðandi, at umsøkjarin hevur áræði og ein positivan hugburð.

**Krøv til umsøkjarnar:**
- hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur ella almanna- og heilsuatstøðingur
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at:
- Menna umsorgan og røkt
- Góða innleiðslu
- Undirvísing
- Góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við deildaraleiðaran á tlf. 477080/217088

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til

Eysturoyar røktar- og ellisheim
Att: fyristøðumaðurin
Friðartún
620 Runavík

Umsóknarfreist: fríggjadagin 25 februar 2008 kl. 12.00

**Eysturoyar Røktar-og ellisheim**
**Friðartún 1 · 620 Runavík**

# Bakara lærlingur

**Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt lærupláss leyst at søkja.**

**Bakaríið Grón hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.**

**Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.**

**Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. matvørutøkning.**

**Lærutíðin til bakara er 3 ár og 7 mðr., harav 38 vikur á tekniskum skúla í Danmark.**

**Ætlanin er, at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.**

**Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.**

Grón síðan 1886

**BAKARÍIÐ GRÓN**
**Hoyvíksvegur 65**
**Tlf. 31 21 61 / 23 62 11**
**Postboks 1048**
**110 Tórshavn**

FAROE SEAFOOD

## MASKINMANN TIL FAROE SEAFOOD TÓRSHAVN

Søkt verður eftir einum maskinmanni, at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin er í samband við dagliga framleiðslu.

Arbeiði umfatar dagligt viðlíkahald av maskinum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jens Paula á telefon 594001.

Umsókn við møguligum prógvum og starvsroyndum skal innan 25/1 sendast til:

**P/F Faroe Seafood, Vestara Bryggja**
Postboks 218 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 355555 · Telefax 312631



Míni mál:

**Ferðavinnan**
**Ítróttur**
**Tónleikur**

Oskar Eiriksson
Fart: 510 796

Fólkaflokkurin

## FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# KUNNGERÐ

## UM LØGTINGSVAL Í FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

Til veljarara til løgtingsvalið 19. januar 2008 í Fuglafjarðar kommunu.

Atkvøðugreiðslan fer fram í **Mentanarhúsinum í Fuglafirði** leygardagin 19. januar 2008 fyri bygdirnar Fuglafjørð og Kambsdal, og í **Bønhúsinum á Hellunum** fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 10.00 og 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

Minnist til at hava valkortið við.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð. Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon **73 77 00** innan kl. 15.00 tann 17.01.2008.

Seinasta dagur fyri brævatkvøður er **fríggjadagin 18.01.2008.**

Fuglafjørður, tann 07.01.2008.

**Fuglafjarðar býráð**

## MIÐVÁGS KOMMUNA

# K U N N G E R Ð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. Mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður við hesum gjørt kunnugt, at Miðvágs bygdaráð á fundi 12. novembur 2007 samtykti at broyta býarplanin fyri Miðvágs kommunu soleiðis, at ein partur av matr. nr. 208a á Suðuroyartrøðni og Gutthústrøðni í Miðvági verður lagt sum B-øki.

Kort, sum vísir broytingina, liggur frammi til alment eftirlit á bygdaráðsskrivstovuni í arbeiðstíðini frá mánadegnum 07. januar til mánadagin 28. januar 2008 báðir dagar íroknaðir.

Møgulig broytingaruppskot ella mótmæli skulu skrivliga verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 07. apríl 2008.

**Miðvágs kommuna**